Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Aksel V. Johannesen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Samkynd og Føroya «grundlóg»

Spurningar:

1. Er tað rætt, sum landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, sigur, at tað stríðir ímóti føroysku "grundlógini" at liva sum samkyndur?
2. Er løgmaður samdur í útsøgnini hjá landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum?
3. Um nei, ætlar løgmaður, at hetta fær nakrar avleiðingar fyri landsstýrismannin í uttanríkis- og mentamálum?

Viðmerkingar:
Okkara landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum segði hesi orðini í Andglettinum í Kringvarpinum í gjár:

«Tað at liva sum sokallaður homosexuellur, tað er í stríð ímóti tí grundlóg, sum eg persónliga havi, og sum Miðflokkurin hevur, og sum eg eisini haldi, at Føroyar hava»

Løgmaður hevur evstu ábyrgd av førda politikkinum hjá landsstýrinum. Tað er eisini løgmaður, sum hevur ábyrgd av, at landsstýrisfólk umboða Føroyar á virðiligan hátt. Um tey ikki gera tað, hevur løgmaður fullan rætt og heimild at taka avgerð um, at hetta fær avleiðingar fyri landsstýrisfólk.

Ein landsstýrismaður í uttanríkismálum er andlitið úteftir hjá landsstýrinum, og tí myndar hann serliga stóran part av landsstýrinum.

Tí verða hesir fyrispurningarnir sett.

Á Løgtingi, 26. oktober 2022

Aksel V. Johannesen